## Piltar



*Royn piltar. Aftan frá vinstru: Jákup Midjord, venjari, Olgar Nielsen, Herálvur Thomsen, Jóan Hammer, Jónar Holm, Eyðun Ellendersen og Kristin Oluf Múller.*
*Framman frá vinstru: Allan Múller, Jóan Petur Johansen , Teitur Midjord, Tóri Nattestad, Arnold West, Bjarni Poulsen, Uni Holm, Benjamin Miné Midjord og Erhard Willumsen*
*Mynd: Áki Bertholdsen*



*AB og Royn spílaðu seg út í seinasta umfarinum, sum varð spælt á grasvøllinum í Hvalba*
*Mynd: Áki Bertholdsen*



*HBb tryggjaði sær silvur á seinasta leikdegnum í Vági*
*Mynd: Bjartur V. Joensen*

HBa og HBb vunnu allar sínar dystir í innleiðandi bólkinum og fóru bæði víðari uttan at lata eitt mál ígjøgnum. Í hálvfinalubólkunum fingu tey eitt sindur størri mótstøðu. HBa kom víðari uttan at tapa ein dyst. Teir vunnu 14 dystir og spældu tveir javnar. HBb kláraði tað næstan líka væl. Teir spældu bert 12 dystir, og her vunnu teir 10, spældu ein javnan og taptu ein.

Bæði liðini komu sostatt í meistarabólkin, og venjararnir høvdu vónir um at fáa tvey heiðursmerki.

Í finalubólkinum gjørdi a-liðið hjá havnarmonnum bart og vann heili 15 dystir, meðan teir spældu ein javnan. Hjá b-liðnum gekst meir striltið. Teir lógu leingi í harðari kapping við TB um annað plássið, og tá síðsta kappingin fór í gongd í Suðuroy, var TB frammanfyri. Her kiksaði TB tó, og HBb kundi so gleðast um silvurheiðursmerkini og harvið eitt heilt fantastiskt ár hjá HB-piltunum.

Annar av venjarunum hjá HB, Høgni Eriksen, heldur, at hetta var eitt ótrúliga flott úrslit.

- Hetta følist gott. Dreingirnir hava klárað tað ótrúliga væl, so vit eru sum vera man væl nøgdir. Í fjør spældu hesir leikararnir heilan vøll, men eg haldi ikki, at broytingin hevur nervað teir nakað. Áðrenn síðsta umfar í Suðuroy lá b-liðið á triðja plássi, og tað hevði ikki verið heilt tað sama, um teir ikki høvdu vunnið silvur. Tað gjørdu teir tó, og hetta eru vit ómetaliga glaðir fyri.

# Nógv feløg vunnu FM

**FM-heitini í yngru deildunum vóru spjødd kring alt landið í ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Feløg kring alt landið vóru við í stríðnum um FM-heiti og gullmerki í hesum kappingarárinum.

Okkurt árið hevur høvuðsstaðurin sitið á stórum parti av FM-heitinum, men soleiðis er ikki longur. Feløgini kring landið eru væl við í FM-kappingunum, og í ár vunnu seks ymisk feløg tey 9 føroyameistaraheitini í yngru deildunum.

HB vann unglingadeildina, piltadeildina og smágentudeildina. KÍ vann smádreingjadeildina og Gentur 10-12. VB/TB vann dreingjadeildina, AB vann gentudeildina, B68 vann smápiltadeildina og B36 vann pinkudeildina.

Fótbóltur hjá børnum og ungum snýr seg ikki bara um at vinna, tað snýr seg millum annað eisini um at menna góðar fótbóltsspælarar, skapa virksemi millum børn og ung, geva børnum hóskandi avbjóðingar í einum sunnum umhvørvi og at strimbra ein góðan felagsskap.

Fótbólturin er ein sera væl umtókt ítróttargrein kring alt landið, og hundraðtals børn eru virkin í fótbóltinum summarhálvuna. Harafturat er tað eisini hugaligt fyri føroyskan fótbólt, at feløg kring alt landið eru við at vinna FM og gullmerki.

Ítróttar-Sosialurin ynskir øllum føroyameistarum hjartaliga tillukku.



*Sørmund Kalsø, liðformaður, tekur ímóti FM-steypinum hjá KÍ smádreingjum*
*Mynd: Guttorm Sørensen*



*Milan Cimburovic og Jón Pauli Olsen, venjarar hjá dreingjaliðnum hjá VB/TB*



*Fótbóltur er sera væl umtókt ítróttargrein millum børn kring landið alt*
*Mynd: Áki Bertholdsen*